# Tann góða tilgongdin hjá foreldrum at børnum við

# AUTISMU

- vegleiðing til foreldur

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
MENTAMÁLARÁÐIÐ
HEILSUMÁLARÁÐIÐ
KOMMUNUFELAGIÐ
AUTISMUFELAGIÐ

# INNIHALDSYVIRLIT


Formæli 03

Tá ábending er um autismu 04

Tá autisma er staðfest 05

Tá barnið fer í skúla 06

Tannárini – vaksnamannatilveran 07

Hent at vita 08



»Tann góða tilgongdin hjá foreldrum at børnum við autismu – vegleiðing til foreldur« er givin út í samstarvi millum Almannamálaráðið, Mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið og Autismufelagið.



# FORMÆLI

Foreldur at børnum við autismu skulu taka støðu til nógv ymisk viðurskifti fyri at tryggja barni sínum bestu umstøður at mennast. Tað kann vera sera trupult at finna útav, hvussu ymsu almennu skipanirnar virka, og hvør veitir hvørjar tænastur.

Øll børn hava sama rætt til almennu tænasturnar – heilsutænastur, pláss á dagstovni og dagrøkt, fólkaskúla, frítíðartilboð o.tíl. Fyri at tryggja javnar atkomumøguleikar mugu børn við serligum tørvi ofta hava stuðlandi fyriskipanir umframt vanligu tænasturnar. Hóast hendan rætt og galdandi meginreglu um geiraábyrgd, so er tilgongdin hjá foreldrum at tryggja barni sínum hendan rætt ofta tyngjandi og fløkt.

Autismufelagið hevur áhaldandi víst á hesa støðu, og hevur saman við Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Mentamálaráðnum og Kommunufelagnum arbeitt við einari verkætlan við endamálinum at finna eina loysn. Orðaða endamálið við verkætlanini er at skipa eina góðatilgongd fyri foreldur at børnum við autismu.

Niðurstøðurnar frá hesum arbeiði eru nú savnaðar í einum tilmæli um, hvussu ein góð tilgongd kann skipast, og yvirlýsing um samstarv um at fremja tilmælini er undirskrivað av landsstýrisfólkunum í almanna-, menta- og heilsumálum og av formanninum í Kommunufelagnum. Vónin er, at almenna tænastan við hesum verður greiðari og betri skipað.

Hesin faldari er ein vegleiðing til foreldur um innihaldið í tí góðu tilgongdini.



# TÁ ÁBENDING ER UM AUTISMU

Tað eru ofta foreldrini, sum fyrst varnast, at barnið ikki mennist sum onnur børn. Kanska er barnið seint at byrja at tosa, ella tað spælir øðrvísi enn hini, ella vísir lutum størri ans enn øðrum fólkum. Í hesi støðuni er tað týdningarmikið, at foreldrini fáa neyðugu hjálpina. Granskingin vísir, at tað er sera umráðandi, at børn við autismu fáa brekið staðfest so tíðliga sum gjørligt, og harvið eisini fáa tillagaðan pedagogikk so tíðliga sum møguligt.

Verður barnið ansað heima, kunnu foreldur venda sær til heilsufrøðingin **www.gigni.fo** ella kommunulæknan um stúranina. Er barnið í ansingartilboði, kunnu tey tosa við starvsfólkini har um stúranina.

Heilsufrøðingurin, kommunulæknin ella starvsfólkini í barnaansingini gera síðan eina meting av støðuni. Hava tey somu stúran um menningina hjá barninum, skipa tey í samráð við foreldrini fyri, at barnið verður tilmeldað Sernámi. Í tilmeldingarskjalinum verða eygleiðingarnar hjá foreldrum og fakfólkum lýstar.

Eru starvsfólkini ikki samd við foreldrini um, at orsøk er at vera stúrin um menningina hjá barninum, kunnu foreldrini sjálvi venda sær beinleiðis til Sernám. Hetta gera tey við at útfylla tilmeldingarblaðið, sum er at finna á heimasíðuni **www.sernam.fo** og senda tað til Sernám.

Sernám greinar síðani støðuna hjá barninum grundað á eygleiðingarnar hjá foreldrum, heilsufrøðingi, kommunulækna og starvsfólkum í barnaansingini. Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur til starvsfólk í barnaansingini við ráðgeving, so námsfrøðin skjótast gjørligt verður tillagað barninum.

Meðan bíðað verður eftir, at autima verður staðfest, bjóðar Sernám foreldrunum uppfylgingarsamrøður hjá sálarfrøðinginum, sum hevur málið hjá teirra barni. Endamálið við samrøðunum er at hjálpa foreldrum at skilja og handfara truplu støðuna, tey tá eru í.

Vísir kanningin á Sernámi, at grundaður illgruni er um, at barnið hevur autismu, so




skal staðfestast, um so er. Sernám vísir tá barninum til Psykiatriska depilin **www.lsh.fo**, sum ger serkanningar og kann áseta at talan er um autismu.

Áðrenn barnið verður ávíst til barna - og ungdómspsykiatriska toymið á Psykiatriska deplinum, skal tað til eina vanliga barnakanning hjá egnum kommunulækna. Ráðini eru, at barnið skal kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu mistakast fyri autismu. Talan kann vera um, at barnið hevur eitt syndrom, at barnið hevur onkra neurologiska sjúku, at barnið ikki hoyrir o.a

# TÁ AUTISMA ER STAÐFEST

Tá autisma verður staðfest hjá einum barni, fáa foreldrini undirvísing á Psykiatriska deplinum, saman við øðrum foreldrum. Endamálið er at læra at skilja, hvat autisma er.

Harnæst verður eitt tvørgeiraligt toymi við einum samskipara skipað til hvørt barn, sum fær staðfest autismu. Toymið verður mannað við foreldrunum og umboðum fyri hvørt av hesum økjum: almannaøkinum, heilsuøkinum, námsfrøðini og sernámsfrøðini.

Psykiatriski depilin, Sernám, og Almannaverkið luttaka í øllum toymum, men annars verður toymið sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum. Er barnið á dagstovni, verður eitt starvsfólk á dagstovninum limur í toyminum. Gongur barnið í skúla og frítíðarskúla, verða eitt umboð fyri skúlan og eitt umboð fyri frítíðarskúlan limur í toyminum. Ein av toymislimunum, oftast umboðið frá Almannaverkinum, verður samskipari hjá familjuni. Toymið hevur fund regluliga einaferð árliga og annars, tá tørvur er. Psykiatriski depilin innkallar til fyrsta fund í toyminum. Seinni er tað samskiparin, sum fyriskipar toymisfundir.

Í gerandisdegnum samskifta foreldrini við tey starvsfólk, sum eru um barnið – tað kann vera í dagstovninum, skúlanum, frítíðarskúlanum og stuðulsfyriskipanini.

Men, hava foreldur tørv á at koma í samband við toymið, skulu tey venda sær til samskiparan.

Toymið ger eina virkisætlan fyri barnið, grundað á tørvin hjá barninum og ynskini hjá barninum og foreldrunum. Allir toymislimir semjast um ætlanina, og soleiðis verða útlitini og gongdin greið, og øll kenna sína uppgávu og ábyrgd. Øll hugsandi ivamál skulu viðgerast í toyminum, og støða skal takast til bestu loysn. Virkisætlanin verður dagførd á hvørjum toymisfundi.

Eftir at ábendingin um autismu er staðfest, og familjan skal fáa gerandisdagin at virka, kann tørvur á kreppuhjálp stinga seg upp.

Er tørvur á kreppuhjálp, skal kommunulækni ávísa foreldrum og barnið til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi. Henda kreppuhjálp verður goldin partvíst við gjaldi frá Heilsutrygd **www.heilsutrygd.fo**, og foreldur kunnu søkja Almannaverkið **www.av.fo** um gjald av egingjaldinum.

Samskiparin hjá familjuni er oftast eisini sosialráðgevi teirra í Almannaverkinum.

Hesin veitir teimum ráðgeving um møguleikarnar fyri fíggjarligum stuðuli eftir almannalóggávuni: endurgjald fyri meirútreiðslur vegna brekið, endurgjald fyri inntøkumissi vegna brekið og hjálparráð.

Somuleiðis veitir samskiparin ráðgeving um møguligar tænastur eftir almannalóggávuni: sosiala ráðgeving, námsfrøðiliga ráðgeving frá autismukonsulenti, umlætting, barnaansing, um barnið ikki kann integrerast í kommunala ansingarskipan, frítíðartilboð eftir at frítíðarskúlin er liðugur í kommununi, vanliga eftir 2./3. flokk.

# TÁ BARNIÐ FER Í SKÚLA

Sernám ger eina støðumeting av barninum í sambandi við skúlabyrjan.

Spurningurin, hvat skúlatilboð er best hóskandi fyri ávísa barnið, verður viðgjørdur í tvørgeiraliga toyminum, tá barnið er um 5 ár. Ivamálini kunnu vera fleiri:

- Skal barnið í vanligan skúlaflokk?
- Hvat tilboð kann skúlin veita?
- Hvønn stuðul kann Sernám veita?
- Hevur skúlin royndir við børnum við autismu?
- Hava starvsfólk neyðugan førleika, ella skal førleikamenning setast í gongd?
- Skal barnið í serflokk?
- Er serflokkur á ávisa skúlanum, ella skal barnið í annan skúla?
- Ber til at samskipa stuðulstiltakið í skúlanum og frítíð?

» Við góðu tilgongdini verður leikluturin hjá ymisku myndugleikunum samskipaður – vit fara at gera tað lættari at vera familja við børnum við autismu í Føroyum. «

Hesar avgerðir verða eftirmettar í toyminum, sum barnið mennist og støðan broytist.

Øll børn, sum hava fingið staðfest autismu, fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til skúla/forskúla. Dagstovnurin og kommunan skulu kunna skúlan um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan. Kunningin verður gjørd í samráð við Sernám.

# TANNÁRINI – VAKSNAMANNA-TILVERAN

Ein nýggj støðumeting verður gjørd, tá barnið er 14-15 ár, og ein ætlan skal leggjast fyri vaksnamannalívinum.

Fólkaskúlin bjóðar øllum børnum við autismu skúlavegleiðing, tá tey eru 14-15 ár.

Tað er somuleiðis ein fastur partur av virkisætlanini at staðfesta, hvat tilboð ávisa barnið hevur ynski um og tørv á eftir loknan fólkaskúla.

**Virkisætlanin skal viðgera hesar spurningar, tá barnið er um 14-15 ár:**

» Hvørji ynskir hevur barnið um útbúgving ella arbeiði?
» Er hóskandi miðnámsskúlatilboð?
» Er annað hóskandi skúlatilboð?
» Er tørvur á arbeiðsbúgvingartiltaki, t.d. arbeiðsroynd?

**Eftir eina mennandi tilgongd í skúlaverkinum ella á arbeiðsmarknaðinum skal virkisætlanin greiða vaksnamannatilveruna:**

» Hvør skal framtíðarbústaðuri vera: íbúð – íbúð við stuðli – pláss í búfelagsskapi – sambýli?

» Hvat verður uppihaldsgrundarlagið: arbeiði – tillagað starv - fyritíðarpensjón?

# HENT AT VITA

**AUTISMUFELAGIÐ**
Tlf. 509031
formadurin@autisma.fo
**www.autisma.fo**

**MBF**
Íslandsvegur 10 c
FO-100 Tórshavn
Tlf. 317373
mbf@mbf.fo
**www.mbf.fo**

**SERNÁM**
Frælsið 32
Postboks 2036
FO-110 Tórshavn
Tlf. 360200
sernam@sernam.fo
**www.sernam.fo**

**PSYKIATRISKI DEPILIN**
Landssjúkrahúsið
J.C. Svabosgøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tlf. 304500
lsh@lsh.fo
**www.lsh.fo**

**ALMANNAVERKIÐ**
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
FO-100 Tórshavn
Tlf. 360000
av@av.fo
**www.av.fo**

**KOMMUNUFELAGIÐ**
R. C. Effersøesgøta 30,
FO-100 Tórshavn
Tlf. 302480
kf@kf.fo
**www.kf.fo**

**HEILSUTRYGD**
Postsmoga 52
Klaksvíksvegur 2
FO-710 Klaksvík
Tlf. 61 40 00
heilsutrygd@heilsutrygd.fo
**www.heilsutrygd.fo**

**GIGNI**
Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
FO-110 Tórshavn
Tlf. 562300
gigni@gigni.fo
**www.gigni.fo**

Serflokkar og onnur
sernámsfrøðilig tilboð

**www.nam.fo**
**www.sernam.fo**

SENDISTOVAN